# Beint í hjartað á havnarfólki

*Høgni W. Larsen eftir lokið verk, 45 akvarrellir úr Havnini, sum nú verða pakkaðar og sendar til bókasølurnar. Vit síggja eisini eyðkendu og vøkru lampuna, sum Høgni hevur teknað.*

*Mynd Jens K. Vang*



LISTAGÁVUR OG JÓLAGÁVUR

*Jan Müller*

Eingin ivi er um, at nógvar eru jólagávurnar at velja millum í hesum døgum. Men ein teirra, sum neyvan nakar ivi er um er sera hent hjá í hvussu er teimum, sum eru uppvaksin í Havnini, og sum er ein gáva fyri lívið og fyri eftirtíðina, eru akvarellirnar – vatnlitstekningarnar – hjá havnamanninum Høgna W. Larsen við heitinum »Havnarmyndir«. Tað hesin djarvi og ágrýtni listarmaðurin hevur lagt úr hondum, er nakað heilt serstakt og helst eindømi í føroyskari listasøgu: listaverkið fevnir um ikki færri enn 45 vatnlitsmyndir í mappu saman við áhugaverdum og undirbyggjandi teksti. Fyri havnarfólk er hetta ein sannur dýrgripur, tí listamaðurin, ið sjálvur hevur reikað runt havnargøtur í eitt mannaminni, hevur gjørt gøtur og býlingar í Havnini livandi við sínum litríka pensli, soleiðis at øll kenna seg aftur – onkunstaðni ella allastaðni.

Høgni hevur teknað og málað alt sítt lív og eru tey nærum hálvthundrað listaverkini gjørd í eitt 20 ára skeið, frá 1982 til í dag. –Eg havi ætlað hetta so leingi og vóni sjálvandi, at serstakliga havnarfólk fara at taka væl undir við hesum sigur Høgni, sum ongantíð fer hálvur men altíð heilur til verka og sum man teljast millum okkara frægastu og mest fjølbroyttu listafólk.

Listagávurnar hevur hann nógvar og fjølbroyttar eisini. Hann er útbúgvin arkitektur og tað er m.a. í hesum arbeiði, at hann hevur gjørt um seg og neglt sín navn so rimmarfast í føroysku kirkjusøguna við at hava teknað vøkru Fríðrikskirkjuna á Nesi og lutvíst tilevnað alt, sum í kirkjuni er, líka frá stakum, lampum til altar og altartalvu.

Við mappuni »Havnarmyndir« hevur listamaðurin tikið eitt rættiliga óvanligt stig, og tað er at seta tekst til fleiri av tekingunum. Fyri at gera tað eins livandi og tekningarnar hevur hann prátað við fleiri tilkomin havnarfólk og burtur úr tí umrøtt einar 11 av gøtumyndunum í býnum, her serstakliga gamlar og søguliga gøtumyndir, ið allar eru so sprenfullar av søgu og minnum.

Í innganginum skrivar listamaðurin m.a. »Enn eiga vit fleiri vakrar gøtur í Havnini, sum kanska um nøkur fá ár eru farnar í søguna. Tað, sum eyðkennir hesar gøtur og ger tær livandi og spennandi, er fyrst og fremst allir litirnir og í góðum sólarljósi skuggaspælið á húsaveggjum og á smølu vegunum. Eisini í kava eru tær hugnaligar og vakrar. Eitt serligt eyðkenni eru vøkru gomlu trøini í smáu urtagørðunum. Tað, ið myndað/skapað hevur hesar gøtur eru tey fólk, ið bygt og búð hava í teimum.« Høgni Larsen hevur gjørt sær tann ómak at seta fleiri kendum og gomlum havnarfólkum stevnu fyri at fáa tey at fortelja livandi frá hesum gøtum. Tey eru Hjørdis Háberg, Sverre Trónd Hansen, Johan Norðfoss, Jákup Lindenskov, Haldor Christiansen og Ása Michelsen. Við øðrum orðum er her talan um eina livandi og spennnandi samanrenning millum listamannin, gøtumyndirnar og frásøgufólkini. Avgjørt ein nýhugsan í listaligum høpi og nakað, sum er vert at geva gætur og sum uttan iva kann vera til íblástur hjá øðrum listafólkum.

Mappan við Havnarmyndum fæst nú í bókasølunum kring landið. Tú kanst velja at keypa eina mappu við 5 tekningum fyri 625 kr. ella velja t.d. eina mappu við øllum 45 tekningunum fyri 5000 kr.



*Mappan við teimum 45 tekningunum, har tú kanst velja, hvussu nógvar tekningar tú ynskir tær.*




**NISSAN MICRA**
Árg jan.99, Km 24.000. aut. gear. Kr. 100.000.



**VW GOLF III**
Árg apr.94, Km 236.000. Diesel. Kr. 73.000.



**VW GOLF LLL**
Árg jun.92, Km 121.000. Kr. 93.000.



**TOYOTA CARINA TURBODIESEL**
Árg mar.97, Km 89.000. Diesel. Kr. 132.000.



**AUDI A4 SEDAN**
Árg jul.96, Km 68.000. Kr. 150.000.



**TOYOTA COROLLA 1,6**
Árg mar.85, Km 256.000. Kr. 32.000.

Audi SEAT

**Bilasølan v/ Øssur Johannesen**
**tel 315354 - www.audi-vw.net**




# Richard Mikkelsen strikes again




*Richard Mikkelsen hevur skrivað bók, har hann ger upp við bankamálið í Føroyum*

**Í nýggjari bók, nevnd Færøerne i bankkrisens tegn, loysir Richard Mikkelsen, fyrrverandi formaður í Fíggingargrunninum frá 1992, frá posabandinum**

BANKAMÁLIÐ

*Edvard Joensen*

Føroyingar hava sjálvur skuldina av, at tað gekk, sum tað gekk í Føroyum í nítiarunum, tá bankarnir máttu bjargast við donskum peningi. Høvdu føroyingar skilt álvaran í støðuni og torað at staðið við sína ábyrgd, hevði málið tikið heilt aðra vend, sigur Richard Mikkelsne í bókini Færøerne i bankkrisens tegn, sum hann hevur givið út í Danmark.

## Sjálvgjørt

At kreppan í Føroyum var sjálvgjørd, ivast Richard Mikkelsen ikki í. Tørvandi virðing fyri fíggjarligu gongdini og manglandi evni ella vilji til at skilja ímillum, hvat var týdningarmikið og ikki, vóru vanlig føroysk eyðkenni, metir hann. Hetta gjørdi seg ikki minst galdandi í móti endanum á bankamálinum.

Ávísir føroyingar royndu eisini at seta donsku hjálpina, føroyingar fingu, í ringt ljós, hóast hendan hjálp var ein heilt greið fyritreyt fyri, at Føroyar reistu seg aftur búskaparliga, sigur Richard Mikkelsen í bókini.

## Pressan

Fjølmiðlarnir bæði í Føroyum og Danmark fáa eisini sítt. Eitt nú verður serliga Sjónvarp Føroya viðgjørt, eins og oddagrein í Sosialinum fær eina spíska viðmerking.

Um tíðindaflutningin sigur Richard Mikkelsen, at endamálið tóktist ikki einans at vera at upplýsa og skapa kjak, men eisini at kappast um at siga sannleikan, hóast eingin reiðiliga visti, hvat hann gekk út uppá. Spurningurin um, hvørt alt nú var farið fram, sum tað skuldi, tóktist gerast tann einasti, sum var áhugaverdur, skrivar hann. Tað er væl skiljandi, heldur Richard Mikkelsen. Men alt ov ofta vóru forhastaðar niðurstøður gjørdar, metir hann.

Frásagnirnar tóktust ganga meira upp á persónar enn málið sjálvt, fýlist hann á. Og tað gjørdi so, at dømingin - sum ofta verður til fordøming - gjørdist ein stórur partur av pressuumtaluni. Miðaldarinnar gapistopkkur er ikki avlagdur. Hann er bara vorðin eitt sindur meira modernaður og raffineraður.

## Politikararnir

Tað er eingin ivi um, at Richard Mikkelsen metir, at føroyskir politikarar eisini lótu seg brúka í málinum. Tá teir hildu seg fáa vinning burturúr.

Eitt nú verður nevnt, at Jóannes Eidesgaard í eini viðmerking til sjónvarpssending um málið hevur nevnt fyrrverandi ríkisumboðsmannin, Bent Klinte, og Richard Mikeklsen fyri trojanskar hestar.

Eisini sjónvarpsmaðurin Høgni Hoydal fekk eftir sjónvarpssendingarnar skjótan politiskan vinning, staðfestir Richard Mikkelsen.

Hann sigur beinleiðis í einum broti, at málið gjørdi, at føroyska loysingarrørslan fekk vind í seglini, og at bæði í Danmark og Føroyum fóru fólk at seta spurnartekin við ríkisfelagsksapin eftir bankamálið.

## Sluppu ov væl

Rishard Mikkelsen heldur, at føroyskir politikarar í grundini sluppu ov væl burtur úr málinum.

»Det virkede absurd, at det var danskere, der skulle hænges ud, samtidig med at færøske politikere, der havde siddet ved styret under krisen eller havde optrådt svagt, da problemerne meldte sig, slap afsted med at opføre sig, som de gjorde.«

Og soleiðis gekk tað, hóast tað var Danmark, sum dró Føroyar inn aftur av eggini. Danmark helt sín part av teimum avtalum, gjørdar vóru. Tað sama kann ikki sigast um føroysku síðuna, sigur Richard Mikkelsen.

Tað er eingin ivi um, at høvdu føroyingar sjálvir borið alla byrðuna, hevði tað verið ein dýr søga fyri føroyska samfelagið, landskassan og skattaborgaran. Hinvegin gjørdust tað nú danir, sum rindaðu fyri tað, føroyingar sjálvir høvdu skapt í Føroyum.

»I sandhed godt scoret af et samfund, der få år forinden havde været på vej til at sejle sig selv helt og aldeles i sænk.«



*Richard Mikkelsen*


